## Nýtt búmerki

Runavíkar kommuna hevur nú fingið nýtt búmerki. Hetta búmerkið kemur ístaðin fyri gamla búmerkið, sum Jacob Petersen á Glyvrum (Jacob á Verkstaðnum) teknaði í 1989.
Búmerkið er teknað útfrá tí gamla, og ein sær klárt tað gamla aftur í tí nýggja.
– Tað nýggja búmerkið er soleiðis ein tilgongd frameftir, ein vøkstur, sum ikki kvettur sínar røtur av, men veksur natúrliga fram, har ein hómar tað, ið farið er, men við kósini frameftir, verður sagt úr Runavíkar kommunu.
Tað er Sjúrður Højgaard frá fyritøkuni Krea ið hevur sniðgivið nýggja búmerkið.

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# Tvey ár við kristnum sjónvarpi

**SØLDARFJØRÐUR** Tvey ár eru liðin, síðani sjónvarpsrásin IKTUS byrjaði at senda. Leygarkvøldið verður tískil eitt live-sjónvarpstiltak í Løkshøll í Runavík.

Snorri Brend

Á tiltakinum leygarkvøldið er ætlanin, at Betesdakórið í Klaksvík skal hava eina »Gaither« framførslu við kór og solistum. Kapelmeistari verður Torkil Mørkøre, sum fer at leiða fólkið gjøgnum gamlar og nýggjar sangir.

IKTUS er ein sokallað free-to-air rás, t.v.s. at hon krevur einki kort, er ókeypis at síggja, og verður fíggjað við stuðlum og gávum.

– Tað eru ikki nóg nógvir stuðlar enn, til tess at IKTUS kann halda á at víðka senditíðina og víðka sendistøðirnar, vísir stjórin, Anja Hansen á.

Hetta kvøldið verður tí eisini høvi at tekna seg sum stuðul, bæði á staðnum og gjøgnum telefon ella teldupost. Ætlanin er, at fólk í Suðuroy og aðrastaðni eisini skulu sleppa at síggja IKTUS.

Allir fastir stuðlar, bæði "gamlir" og nýggir, fáa eina DVD ella fløgu, sum er framleidd til endamálið. Tað er ein upptøka av einum góðum sangkvøldi, sum bólkurin VITIN úr Klaksvík hevði í Løkshøll í november mánaði í fjør.

IKTUS og Lindin fara at senda tiltakið beinleiðis frá tiltakinum, sum byrjar kl 19.



**SJÓNVARP**

*Kristna sjónvarpsrásin IKTUS hevur sent í tvey ár, og røkkur ein stóran part av landinum. - Men ynski eru komin um at skipa soleiðis fyri, at t.d. suðuroyingar kunnu síggja okkara rás, sigur Anja Hansen, stjóri á sjónvarpsrásini.*

# Eliesar Kastalag 40 ára starvsdag



**ROYNDIR**

*40 ár á sama staði er ikki hvørs mans føri. Men Eliesar Kastalag hevur starvast á sama staði í so langa tíð*

1. mai hevði Eliesar Kastalag 40 ára starvsdag hjá Runavíkar kommunu. Móttøka verður fyri honum fríggjadagin. Tá Eliesar byrjaði í starvi hjá kommununi vóru bara 3 starvsfólk á kommunuskrivstovuni. Umframt hann var Karl Jóhan Hansen, kommunuskrivari og Jóhan Dávid Thomsen, bókhaldari. Eliesar dugir væl at siga frá, og veit nógv at fortelja um tíðina hann hevur starvast innan tekniska økið hjá kommununi og saman við teimum ymisku politikarunum sum hava sitið hesa tíðina.



# Dagbók

## Mikudagur 21. apríl

**Ringurin:**
Hey! Í dag byrjaði dagurin sum vant við ringinum. Vit lærdu fyrst, nær vit vóru fødd, og síðan eftirnavn okkara. Øll skuldu siga sítt eftirnavn, og nær vit vóru fødd. Vit lærdu eisini tølini.

Knappliga, meðan vit soleiðis sita og tosa, koma tveir menn á gátt. Teir hava við sær eitt stórt myndatól. Men tað løgdu vit einki í. Vit fóru bara undir at syngja nakrar sangir, sum vit hava lært. Fyrst sungu vit »Tjaldur, ver vælkomið«, síðani »Eg fái mær eitt krít«, og til endans »Burtur á heiði«. Aftaná fingu vit frukt. Meðan vit gnaddaðu fruktina, hoyrdu vit søguna um lítla Álv. Tað var hugnaligt og stuttligt.

**Túrurin:**
Aftan á ringin fóru vit at lata okkum í. Tíverri vóru Maria, Marjun, Samson og Erika ikki í barnagarði í dag.

Kalt var. Kavin hevur argað okkum nú í nakrar dagar. Men vit eiga øll heit klæði, tíbetur.

Leiðin gekk niðan í hagan til Huldusteinin. Tað er so stuttligt at ganga niðan har. Vit sóu nógv spennandi á vegnum. Har var seyður, gæs, dúgvur, tjøldur og onnur fuglasløg, ið sungu og lótu.

Spennandi var eisini at leypa yvir um veitirnar, sum í dag næstan ikki sóust fyri øllum kavanum. Vit hoyrdu tær bara, hvussu tær tutlaðu undir kavafonnunum.

Heldur hált var eisini, men tíbetur var bleytt og gott at lenda, um onkur datt á tí dýggjváta og kavaprýdda grasinum.

Komin niðaná settu vit okkum øll við Huldustein, og sum altíð á túrum okkara, hövdu vit matpakkarnar við. Noomi og Barba bjóðaðu matpakkarnar í dag. Tær valdu eisini ein matarsang hvør. Og meðan vit ótu, smíltist sólin av og á og hitaði okkum.

Tá ið vit vóru liðug at eta, fóru vit at spæla. Vit klintraðu upp á teir stóru steinarnar, bankaðu upp á dyrnar á Huldusteininum. Vit óku oman eftir brekkunum og spældu við gler, sum vit funnu oman á hyljunum. Eisini spældu vit við mosa og hagalyng. Vit spældu, at tað var matur.

Men ein heilt serligan fong funnu vit. Eitt íshjarta – eitt hjarta úr gleri. Marjus fann tað oman á einum hyli. Tað tóku vit við okkum oman í barnagarðin og løgdu tað uttanfyri í kavan. Síðan fóru vit inn at lata okkum úr vátu kavadraktunum.

Aftan á teir leskiligu bollarnar, sum Kára hevði bakað til millummála, fóru nøkur børn út at leita eftir maðkum at koyra í krukkur og koppar. Tað halda mammurnar og pápanir er so stuttligt at fáa heim við.

Nú gleða vit okkum bara at vita eftir, um íshjartað er bráðnað, tá ið vit aftur koma í Náttúrubarnagarðin í morgin. Takk fyri í dag.

**Heilsan**
**– stór og smá í Víkini í Æðuvík.**